## Føroyar eisini við í komandi kanningum

**10. - 13 september var granskarafundur um 9. floks kanningarnar komandi hildin í Føroyum**

HEILSA

Granskarar úr 35 londum í Evropa savnaðust til fundar í Havn í døgunum 10.-13. september at leggja til rættis komandi kanningarnar í 9. flokki.

Talan er um tær sonevndu ESPAD-kanningarnar, European School Survey Project on Alchol and Other Drugs. Kanningarnar hava til endamáls at kanna hugburð og atburð mótvegis rúsdrekka, narkotika, tubakki og harðskapi. Hesar kanningar hava verið samskipaðar í Evropa síðan 1993.

Á hesum sinni var tað Deildin fyri Arbeiðs- og Almannheilsu og Fyribyrgingarráðið, sum í felag skipaðu fyri fundinum. Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum heilsaði á samkomu í Listaskálanum gestunum vælkomnum.

Ráðstevnan varð hildin í fundarsalinum á Landssjúkrahúsinum. Niðurstøðan gjørdist, at vit aftur í mars 2006 eiga at gera samskipaðar kanningarnar um alt Evropa.

Ætlanin er, at Føroyar eisini skulu vera við í komandi kanningum. Slíkar kanningar hava verið gjørdar í Føroyum síðan 1989, soleiðis at vit nú hava eitt gott og rúgvismikið tilfar til at lýsa gongdina viðvíkjandi hesum vandamálum hjá ungdóminum, sigur Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Fyribyrgingarrráðið í tíðindaskrivi.

## STROK aftur í skúlunum

BARANA- OG UNGDÓMSBLAÐ

Fyri nøkrum døgum síðan fingu skúlabørn kring alt landið høvi at seta seg fyri barnablaðið- og ungdómsblaðið Strok fyri skúlaárið 05/06. Flest øll børn og vaksin vita um blaðið, sum seinastu árini hevur havt einar 3.200 haldarar. Allir næmingar í fyrsta flokki fáa fyrsta blaðið ókeypis, so tey fáa høvi at kunna seg við blaðið. Blaðið vendir sær bæði til tey yngru og eldru børnini við fjølbroyttum tilfari. Á opnuni í miðjuni er ynskimyndin, sum øll kunnu ynskja sær. Í fyrsta blaðnum hesa ferð er mynd av Batman, ið júst hevur verið frammi við nýggjum filmi.

Innihaldið er sera fjølbroytt: Í hvørjum blaði eru greinar um okkurt serligt evni, har vit eisini práta við børn og ung. Hesa ferð snýr tað seg um at standa á rennifjør og um summarforelskilsi. Tíðindafróða sigur tíðindi úr øllum heraðshornum, og aftervendandi eru forvitnisligar frásagnir úr søguni, Blits - súrt og søtt um teykendu, uppgávusíður, gaman, teknisøgur, krossorðagátur, søgur, teknisøgur, úr Bíbliusøguni, fleiri uppgávusíður o.m.a. Í fleiri førum ber til at senda loysnir inn og sostatt vera við í lutakasti um at vinna núggja flotta STROK-pennin, fløgur, ymiskar bøkur o.a.

Sum nakað serstakt er stór haldarakapping á skránni í ár, har vinningurin er ein spennandi familjuferð til Danmarkar við Norrönu, har tvey vaksin og tvey børn sleppa at búgva í íbúð í Danlandi og fáa ókeypis atgongumerki til Fårup Sommerland, Legoland og djóragarðin í Ålborg.

Blaðið kemur út 8 ferðir í skúlaárinum, tað er 40 bls. í litum. Tey flestu tekna seg sum haldarar í skúlunum, og tá er haldaragjaldið kr. 150 fyri alt skúlaárið. Tað ber eisini til at fáa blaðið sendandi við postinum, um tú vendir tær til Bókamiðsøluna og bíleggur blaðið, sum tá kostar kr. 150 + postgjald.

STROK verður umbrotið, prentað og heft á Pf. Føroyaprent.

Í blaðstjórnini eru Niels Jákup Thomsen, blaðstj., Beinta Johannessen, Jonna Olsen og Eyðna Magnussen.



# Blásarakvintett Reykjavíkur vitjar í Føroyum

**Konsertfelagið fær nú í næstum vitjan úr Íslandi av Blásarakvintett Reykjavíkur. Hesin bólkur man vera tað íslendska ensemblið av sínum slag, ið hevur gjørt mest vart við seg í útheimi. Bólkurin er mannaður við fremstu tónleikarunum og eru flestu teirra eisini sololeikarar í Íslendska Symfoniorkestrinum**

BLÁSARAKONSERT

Blásarakvintett Reykjavíkur varð stovnað í 1981 og hevur síðani ferðast kring allan knøttin. Carnegie Hall, Wigmore Hall, Sydney Opera House, eru millum allar tær hallir, ið hesin úrmælingabólkur hevur framført í. M. a. hevur kvintettin verið við í fylginum hjá fyrrverandi forseta Íslands, Vigdís Finnbogadóttir. Í hesum leikluti, sum tónleistarligir ambassadørar, hava teir framført fyri ensku drotningini og spanska konginum.

Fløgur teirra eru útgivnar á fremstu forløgum m. a. Chandos og BIS. Eisini eru ummælini sera góð.

Bólkurin spælir verk úr øllum tíðarskeiðum og eru ørgrynna av verkum skrivað júst til teirra av tónaskøldum.

Tónleikararnir eru allir millum teir fremstu í Íslandi, men kenna vit tó best Bernharð Wilkinson, floytuleikaran, ið nú er búsettur í Føroyum. Hinir limirnir eru: Daði Kolbeinsson, obo, Einar Jóhannesson, klarinett, Hafsteinn Guðmundsson, fagott og Jóseph Ognibene, horn.

Kvintettin er sera virkin í samband við vitjanina í Føroyum. Teir geva Føroya Symfoniorkestri eina hjálpandi hond og fara umframt tær vanligu konsertirnar, at hava skúlakonsertir fyri næmingum. Harafturat fara teir at hava eina felagskonsert við føroyskum musikklærarum.

Fyrra konsert teirra verður í Norðurlandahúsinum týskvøldið 4. oktober kl. 19.30. Har fer føroyski klaverleikarin Jóhannes Andreasen, at luttaka í framførsluni av tí víðakendu sekstettini hjá François Poulenc.

Seinna konsertin verður í Listaskálanum hóskvøldið 6. oktober kl. 19.30. Á hesi konsertini verður eisini ein føroysk blásarakvintett nevnd KINKVI. Í hesi kvintettini eru: Andrea Heindriksdóttir, floyta, Kári Bæk, obo, Peder Riis-Jensen, klarinett, Christina Andersen, fagott og Kjell Orseth, horn. KINKVI og Blásarakvintett Reykjavíkur fara at framføra eina sera spennandi skrá saman. Hetta verður úrslitið av teirra samarbeiði hesar dagarnar. Spennandi verður at hoyra.

Konsertfelagið skipar fyri hesi vitjaninini í samstarvi við Norðurlandahúsið, Føroya Symfoniorkestur, Listasavnið og Tórshavnar Musikkskúla.

Atgongumerki fáast við dyrnar. Allir skúlanæmingar hava ókeypis atgongd.

# Ísland nýggjan samstarvsráðharra

**Sigríður Anna Þórðardóttir er nýggju norðurlendskur samstarvsráðharri Íslands. Fyrsta uppgáva hennara verður Norðurlandaráðasfundurin í Ìslandi 25. - 27. oktober**

NORÐURLANDARÁÐIÐ

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



Týsdagin var umhvørvisráðharri Íslands, Sigríður Anna Þórðardóttir, útnevnd til norðurlendskan samstarvsráðharra í íslendsku stjórnini. Hon tekur yvir málsøkið frá Valgerður Sverrisdóttir, sum hevur verið ídnaðar-, orku- og handilsmálaráðharri eins og norðurlendskur samstarvsráðharri síðani september í fjør.

Fyrsta uppgávan hjá Sigríður Anna Þórðardóttir sum samstarvsráðharri verður at vera við á fundinum hjá norðurlendsku samstarvsráðharrafundunum í sambandi við norðurlandaráðsfundin, sum verður í Reykjavík 25. til 27. oktober.

Sigríður Anna Þórðardóttir er 59 ára gomul. Hon hevur verið umhvørvisráðharri síðani 15. september í fjør. Hon var limur í Norðurlandaráðnum frá 1991 - 2004 og forseti fyri Norðurlandaráðið 2000-2001. Hon sat í stýrinum fyri Norðurlandahúsið í Íslandi 1994-2004 og var forkvinna í íslendsku sendinevndini í Arktiska Ráðnum 2002-2004.